

Mynd: Widerøe

# Fyrimunur fyri føroyingar at tað verður tættari flogsamband millum Bergen og Aberdeen

**Jógvan Hugo Gardar**

23.11.2014 - 18:20

Oljan.fo

Norska flogfelagið Widerøe og bretska Easterns Airways hava undirskrivað eina samstarvsavtalu. Ferðafólkini hjá Easterns sum flúgva millum Stórabretland og Noreg skulu nú sendast við Widerøe. Hinvegin kann Widerøe nú knýta sítt ferðasamband við netið hjá easterns í Bretlandi.

Nýggja avtalan kann eisini merkja at tað verður einfaldari, og ikki minst skjótari at sleppa úr Føroyum til Bretlands teir dagarnar Atlantsflog ikki flýgur. Nú kann ein í staðin fyri Kastrup flúgva til bergen, og haðani sleppa til Avberdeen og víðari í Bretlandi.

Terje Skram, deildarstjóri í Widerøe, sigur at tey gleða seg til at kunna bjóða fram eitt tilboð har rutunetini hjá teimum báðum flogfeløgunum nú kunnu samskifta betri.

Easterns Airways heldur til í Grimsby, og hevur fleiri enn 800 fráferðir um vikuna í Bretlandi. Við nýggju avtaluni kunnu kundarnir hjá easterns flúgva frá Aberdeen og Newcastle til Stavanger og Bergen.

Samstarvið millum hesi bæði feløgini er eisini ein roynd at bjóða oljuídnaðinum betri samskiftismøguleikar millum oljubýirnar Aberdeen og Stavanger. Easterns Airways hevur longu í dag eitt rutunet sum passar starvsfólkum í oljuídnaðinum gott. Widerøe er flogfelagið sum bindur norsu vesturstrondina saman við einum hópi av lokalrutum frá Kristiansand fyri sunnan og norð til Vadsø í Norður-Noregi.

Eastern Airways hevur í dag fráferðir úr Aberdeen, Birmingham, Cardiff, Durham Tees Valley, East Midlands, Humberside, Leeds Bradford, Lorient, Lyon, Newcastle, Norwich, Scatsta, Southampton, Stavanger, Stornoway, Sumburgh og Wick.